VINNUSÍÐURNAR

# Føroyar og Peru kunnu hava



*Anfinn Olsen, Eduardo Pastor, Jógvan Martin Joensen, Alejandro Jimenez Morales fiskivinnuráharri, Walter Benavente Collantes ráðgevari, Pedro Oleachea varakonsul og Bogi Eliasen*

**– Føroysk fiskivinna kann fáa stórar møguleikar í Peru, sum er heimsins næststørsta fiskivinnutjóð**

## Altjóða samstarv

*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Møguleikarnir hjá føroysku fiskivinnuni á fjarleiðum verða alsamt trengri og trengri.

Fyri at fáa fleiri bein at standa á, hava føroyingarav og á roynt at menna fiskivinnusamstarv við fjarskotin lond. Í hesum sambandi hava vit roynt okkum í Ný Sælandi og ymsastaðni í Afriku.

Men hesar royndir hava allar verið miseydnaðar.

Nú royna vit so einaferð afturat. Aftrur hesuferð er tað langt burturi, við kyrrahav, beint sunnanfyri miðkringin, – í Peru.

Og tað kann so skjótt vera at fiskivinna í Føroyum og Peru fara at ganga saman í eitt samstarv, sum kann verða ógvuliga gevandi fyri báðar partar.

Og tað eru nógv betri útlit til, at hetta samstarvið fer at hepnastbetri, tí hesuferð er ætlanin at fara ørðvísi til verka, sigur Bogi Eliasen á uttanríkisdeildini hjá landsstýrinum, sum hevur avbeitt við hesi ætlanini fyri landsstýrið.

Hann sigur, at í hesum føri er ætlanin at menningarhjálp og vinnuligt samstarv skulu ganga hond í hond.

– Tað byrjaði alt við einum vilja hjá hesum landsstýrinum um, at føroyingar átaka størri altjóða ábyrgd í sambandi við menningarhjálp.

Altjóða samfelagið hevur meiri ella minni sett sum mál, at tey ríku londini eiga at brúka 0,7 % av bruttutjóðarinntøkuni til menningarhjálp.

Men tað er so ómetaliga langt frá, at føroyingar hava livað upp til hendan setningin, tí hesi seinastu árini hava vit bara brúkt 300.000 krónur um árið til menningarhjálp. Skuldu føroyingar livað upp til altjóða ásetingarnar, skuldu vit latið sjey milliónir í menningarhjálp. Tað hevur hetta landsstýrið sett sær fyri at bøta um og á fíggjarlógini fyri 2005, er játtanin til menningarhjálp 10 faldað upp í 3 milliónir.

I hesum sambandi hevur landsstýrið eisini sett sær sum mál, at peningurin skal brúkast til veruliga menningarhjálp og ikki bara til hjálp í sambandi við vanlukkur. Sostatt skal peningurin brúkast til menningarhjálp og ikki bara til neyðhjálp.

– Peningurin skal sostatt ikki bara latast, men heldur brúkast til burðardygga menning í einum øki, sigur Bogi Eliasen.

Hann sigur, at landsstýrið helt tað vera rættast at brúka peningin í einum oyggjalandi, sum líktust Føroyum ella at brúka teir í einum ávísum øki í einum størri landi.

– Men fyri at fáa skapa burðardygga, vinnuliga menning í einum øki, er tað av stórum týdningi at hava vinnulívið við, tí tað er vinnulívið, sum dugir best at menna eina vinnu og sum dugir best at ráðgeva um vinnulív og sum dugir best at loysa ávísar vinnuligar uppgávur í landinum, sum menningarhjálpin skal latast til.

– Vit høvdu væntað, at tað skuldi taka okkum nøkur ár at sannføra vinnulívið í Føroyum um at hetta kundi verða ein møguleiki.

– Men eftir at frágreiðingin um menningarhjálp hevði verið fyri í løgtinginum, hendi tað, at vinnulívsfólk vendu sær til okkara og vístu okkum á Peru. Talan var um fólk, sum høvdu innlit í viðurskiftini í Peru og sum eisini høvdu ítøkilig vinnulig áhugamál. Men tey vildu eisini arbeiða við menningarhjálp. Hetta er eitt arbeiði sum kollfirðingurin, Jógvan Martin Joensen, hevur samskipað.

– Tá ið tað nú vísti seg beinanvegin at vera ein ítøkiligur áhugi fyri Peru, gjørdi landsstýrið av at taka av tilboðnum, um vit kunnu siga tað soleiðis, heldur enn at brúka langa tíð at leita eftir øðrum, hóskandi ætlanum.

Í hesum sambandi var Bogi Eliasen í Peru í summar. Samstundis var ein sendinenevnd av føroyskum vinnulívsfólkum í Peru.

Menningarhjálpin og vinnuligi áhugin annars eru atskild, men tað gagnar avgjørt einum slíkum arbeiðið at hava vinnulívið við og tað er ein fyrimunur at taka báðar tættirnar við. Og tá ið